

# Fjølmiðlar uttan kritiskan journalistikk er ein ræðumynd

**Jón Brian Hvidtfeldt**

**Tíðindaleiðarin í Kringvarpinum er hóttur av uppsøgn, og hevur verið á forsíðunum av føroysku bløðunum. Hann er endaður í stríði millum starvsfólk, stjóra og stýri, og hann var ímillum gestirnar í Hvonn Live leygarkvøldið**

HVONNLIVE
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*



**Hvussu kennist tað, at journalisturin alt fyri eitt gerst søgan?**
*Tað er nakað lort. Journalistar eiga at skriva søgurnar, ikki verða søgan.*
*Ekstra Blaðið plagar at siga »velkommen på forsiden«. Hvussu kennist tað at verða á forsíðunum? Tað er stuttligari at skriva, enn sjálvur at enda um søgan.*
*Journalisturin eigur at leggja navn til tær góðu søgurnar, ikki sjálvur verða søgan. Tað hevur ikki verið hugaligt.*

**Tú hevur fingist nógv við kritiskan journalistikk. Hvussu hevur tær dámt tað?**
*Tað er ótrúliga spennandi. Tær løturnar man sleppur at gera kritiskan journalistikk, ger alt tað vert.*
*Ber tað til at gera kritiskan journalistikk í einum so lítlum samfelagið sum Føroyar?*
*Sjálvandi. Tað ber væl til í einum lítlum samfelag, sjálvt um vit øll kenna hvønn annan og hittast á gøtunum. Men ger journalisturin sítt handverk ordiligt, og hevur umstøður til tað, so ber tað væl til.*

**Er tað ikki skjótt, at keldurnar torna?**
*Um fólk verða rættvíst viðfarin, so torna tær heldur ikki.*

**Er tað eingin, sum hevur reagerað negativt upp á kritikk?**
*Í løtuni. Vit eru øll menniskju, og vit reagera í einari heitari løtu. Men so fer tað eisini bara framvið aftaná.*

**Er tað ofta, at journalisturin verður skotin?**
*Ja. Aftur tað, at tað er eitt lítið samfelag, og vit síggjast tí altíð aftur. Um journalisturin hevur gjørt eina kritiska søgu, so verður tað mangan ikki tosað um søguna, men heldur um okkurt, sum journalisturin hevur gjørt í øðrum sambandi. Tað er eisini at skjóta journalistin.*

**Hvussu hevur tú tað við tí trýstinum?**
*Tað er eitt arbeiði eins og alt annað, so tað er ein partur av tí. Tað einasta ringa er, at um man ikki hevur gjørt sítt handverk ordiligt, og hevur sett onkran í ringa støðu av órøttum, so er tað ótrúliga keðiligt.*

**Hvussu sært tú støðuna við kritiskum journalistikki í Føroyum?**
*Eg haldi, tað er alt ov lítið av tí. Tað er eitt ávaringartekin, sum vit mugu taka í størsta álvara í øllum miðlunum. Fjølmiðlar uttan kritiskan journalistikk er ein ræðumynd.*

**Hvat er orsøkin til, at tað er ov lítið av kritiskum journalistikki?**
*Tað kann verða so nógv. Millum annað raðfestingar, fíggjarligar umstøður o.s.fr. Vit hava øll eina viftu av tilboðum, men tað skal raðfestast. Tað er nógvir dugnaligir journalistar í øllum miðlunum, so í so máta eru vit ikki illa fyri.*

**Hvønn týdning hevur tað at hava kritiskan journalistikk í Føroyum?**
*Týdningurin kann næstan ikki mátast. Vit mugu hava kritiskan journalistikk í øllum viðurskiftum. Verður tað ikki sett spurnartekin, ella givið mótspæl, so fara vit lallandi út eftir gøtuni, og eingin veit, hvar vit enda. Tí er tað alneyðugt at hava kritiskar journalistar, sum tora at seta røttu spurningar til røttu tíð.*
*Taka vit málið hjá Rósu Samuelsen sum dømi, so hevði kritiskur journalistikkur verið, at tikið málið upp í fjør, tá ið fíggjarlógin var til viðgerðar. Tað einasta vit gera nú, er at referera frá málinum.*

**Hvat heldur tú er orsøkin til, at fjølmiðlarnir ikki varnast hetta mál fyrr enn nú?**
*Tað kunnu verða fleiri orsøkir. Alt frá manglandi resursum til manglandi yvirblik og raðfesting. Eg veit, at í Kringvarpinum hevur okkara viðgerð av fíggjarlógini verið alt ov vánalig, og tað er eisini galdandi fyri privatu miðlarnar. Men man roynir eftir førimuni, og trupulleikin er kanska, at man ikki fer inn og raðfestir og sigur, hvat er týdningarmikið.*

**Tú ert tíðindaleiðari í Kringvarpinum, og hví hevur tú so ikki raðfest øðrvísi?**
*Góður spurningur. Har skal eg kanska bara fleingja meg sjálvan, tí tað er ikki gott nokk. Vit mugu bara taka í egnan barm, tí tað er neyðugt at gera tað betri. Vit mugu eisini skapa umstøðurnar til at gera tað betri.*

**Er ein kritiskur journalistur av sær sjálvum ein góður leiðari?**
*Eg kenni fleiri journalistar, sum alt ikki høvdu viljað verið leiðari. Men man má tíma, vilja og hava dirvi til tað, og samstundis verða trúfastur móti sínum journalistikki. Og sjálvandi skapa umstøður soleiðis, at tú ført tín journalistikk víðari til hini starvsfólkini.*

**Hvussu hevur tú trivist í starvinum sum tíðindaleiðari í Kringvarpinum?**
*Ja, nú fekk eg ikki so nógva tíð at royna tað. Eg hevði bara verið leiðari í 15 mánaðir, tá ið eg fekk tað vælsignaða ætlanarskrivið um uppsøgn, sum so nógv hevur verið tosað um. Men eg trívist væl, og hevði annars eitt gott starv á Rás2, áðrenn eg søkti í Kringvarpið. Eg vil hetta starvið, tað var eisini tí eg søkti. Men tað er strævið og hevur nógvar avbjóðingar eisini.*

**Tú hevur ikki verið nógv at hoyrt í útvarpi síðani tú gjørdist tíðindaleiðar. Saknar tú ikki tann partin?**
*Givið er tað, at ført tú journalistikk inn í blóðið einaferð, so er tað altíð har. Tað trúgvi eg, at øll, sum hava roynt tað, kunnu nikka ja til. So sjálvandi sakni eg tað, men tað er eisini spennandi at forma redaktiónirnar fram ímóti týdningarmiklum tingum.*

**Skal ein kritiskur journalistur taka sær av vaktarskemaðum og játtanum?**
*Eg trúgvi ikki at nakar søkir eitt leiðarastarv fyri at gera vaktarskema. Tað er eitt amboð í gerandisdegnum, men man má ansa eftir ikki at drukna í vaktarskemaum.*

**Hvussu kendist tað, tá ið tú fekk at vita, at ætlanin var at siga teg úr starvi?**
*Tað kann kanska samanberast við, um eg tók tína mikrofon beint nú. Tú hevði allarhelst mist fótafestið eina løtu, síðani blivin ørkymlað og ill og at enda hevði tú roynt at fingið mikrofonina aftur. Tað er soleiðis eg havi tað.*

**Høvuðsákæran er, at tú ikki hevur hildið játtanina fyri 2009. Hevur tú ikki dugað nóg væl við tí fíggjarliga partinum?**
*Tað kann altíð gerast betri. Tað, sum hendi í 2009 var, at nógvar sparingar vóru í Kringvarpinum, samstundis sum fleiri nýggjar deildir vóru settar á stovn. Og aftrat hesum so má sigast, at tíðindi henda ikki bara millum 08 og 16. Men eg havi roynt at gera alt eftir besta førimuni.*

**Sum tíðindaleiðari er tað ikki tín uppgáva at siga nei til ymsar søgur, tí tað fíggjarliga ikki kann loysa seg?**
*Jú, tað geri eg sanniliga eisini hvønn dag. Hvønn dag noyðast vit at velja frá. Tað er ótrúliga keðiligt at vita, at ein góð søga er har úti, sum vit ikki røkka.*

**Er tað nakað serligt mál, sum tú heldur ikki hevur verið nóg væl lýst?**
*Ja, eitt nú fíggjarlógin, málið um Skálaberg og so framvegis. Og eg kann nevna 50 onnur líknandi mál, sum ikki hava verið nóg væl dekkað.*

**Hvussu hevur tú merkt stríðið millum teg og Anniku Mittún Jacobsen?**
*Eg veit ikki. Tað er bara ein støða, sum er sum hon er. Eg taki tað bara við á vegnum. Summi ting endar man bara í uttan at vita tað, og tá tekur man tað bara har frá. Tað er ikki óvanligt, at ósemjur eru millum starvsfólk og stjóra.*
*Men hevur hetta kanska verið øðrvísi, nú málið hevur verið alment frammi?*
*Tað er sjálvandi øðrvísi, tá ið man endar í bløðunum móti sínum egna stjóra. Men vit liva í einum fjølmiðlaheimi, og Kringvarpið er ein stovnur, sum allir føroyingar eiga, gjalda til og hava áhuga fyri, so tað er kanska bara ein partur av starvinum at enda í bløðunum.*

**Væntar tú, at tú sleppur at halda fram sum tíðindaleiðari?**
*Tað er eg ikki einsamallur um at taka avgerð um, men eg søkti starvið, tí eg vil hava tað. Hevði eg onga vón um at halda fram í starvinum, so var eg allarhelst onkra aðrastaðni nú.*

**Heldur tú, at tey 17 starvsfólkini á tíðindadeildini, sum alment hava boðað frá, at tey stuðla tær, fara at hava eina ávirkan á málið?**
*Tað vóni eg. Tað er í øllum førum ikki gott, um ein leiðsla ikki lurtar eftir einum so stórum fakbólki. Eg skal ikki blanda meg, men eg haldi hatta er ein bólkur av fólki við sterkum meiningum sum tosa, og tað eigur leiðslan at lurta eftir.*

**Um tú ikki kann halda fram, hvat so?**
*Eg veit ikki. Men eg eri bara 32 ár, so verðin gongur ikki undir, um eg ikki sleppi at halda fram. Men eg ætli mær at stríðast fyri tí.*

